miðvikan

Nr. 226 • 25. november 2009

**Siðsøguligt tilfar**
í Sosialinum mikudagar



**Gerda Einarsson:**

# Giftist við Poul og gjørdist fiskimannakona

**Vit hava í trimum pørtum fylgt Gerdu frá barndóminum í Puntabyrgi til arbeiðið í AT, størstu arbeiðarafyritøku, sum hevur verið í Føroyum. Men nú verður Gerda Mortensen gift Einarsson**



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

**4. partur**

Hjá ungdómi á Tvøroyri var nóg mikið at fáast við. Eitt av hesum var losjan, har eg var virkin í fleiri ár umframt at eg eisini var skóti.

Í losjuni var nógv virksemi. Tað vóru fundir mikudagar og sunnudagar, har nógv var á skránni. Ofta var eisini skipað fyri útferðum. Eg minnist, at vit eina ferð vóru 15 gentur og dreingir, sum fóru á súklu til Fámjins.

Losjan á Tvøroyri var annars millum tær fyrstu, tá ið losjurørslan tók seg upp. Hon var stovnað 15. november 1904. Í fyrsta umfari dovnaði hon nokk so skjótt afrur.

Men í 1928 varð Tvøroyra Framtíð, sum losjan varð kallað, endurrreist við Alberti Jacobsen sum høvuðsmanni. Limatalið gjørdist stórt. Tað lá um 100 og kom onkuntíð upp í 200. Millum leiðandi losjumenninar í 30-unum var Gunnar Petersen, mammubeiggi. Hesa tíðina vóru eisini skipað fyri fráhaldsfótbóltslið. Í 1930 vitjaði Afholdsfolkenes Idrætsforening í Danmark AIF-feløgini í Føroyum. Tað varð eitt lið av spælarum úr Havn og av Tvøroyri, sum spældi ímóti danska liðnum. Gunnar var tá við í føroyska liðnum.

Stovnað varð eisini í 1936 ein ungmannadeild hjá Tvøroyrar Framtíð, sum fekk nokk so nógvar limir.

Slagorðið hjá ungmannadeildini á Tvøroyri var "Stríð, Friður, Semja" við útgreinandi orðunum: "Í stríðinum skal friðurin vinnast – ein semja, ið ættirnar minnast."

Stutt eftir varð eisini ein barnalosja stovnað. Hon kallaðist Tvøroyrar Vón og fekk ikki færri enn 105 limir.

Tann, sum eg minnist best av teimum, sum stóðu fyri losjuni, var Jens Gudmundsen.

Tað var kanska óbeinleiðis gjøgnum losjuna, at eg kom í samband við Poul. Ein gubbi hansara var eisini losjulimur. Poul var í Íslandi og bygdi flogvøll í 1941, tá ið hann kom heim aftur, segði gubbin við hann, at nú hevði hann funnið honum eina konu í losjuni, og tað var eg.

Vit komu so at kennast, men tá var tað ikki sum nú, at kastað verður saman beinanvegin. Vit skuldu í hvussu er hava hús, so vit giftust 20. desember 1947.



*Losjufólk í Havn á vitjan á Tvøroyri í 1939. Við fløggunum hjá losjunum fremst og fløggunum hjá ungmannafeløgunum beint aftanfyri fara losjufólkini skrúðgongu gjøgnum bygdina*

## Búði í úthúsi

Pápi Poul var íslendingur, Stefan Einarsson, kallaður Stebbi. Hann var frá Ísafirði. Mamman var Poulina Niclasen í Sodnhúsinum í Valinum. Hon var systir Sannu, mammu Herborg á Hotellinum. Ein systir Ingeborg var gift við Mortan Jacobsen, og hálvsysturin Louise var gift við Marius Eidesgaard, kallaður Marius á Eiði. Louisa var markant kvinna, sum greitt verður frá í komandi parti. Beiggjarnir hennara vóru Petur, kallaður Traberg, Tummas, Thorstein,sum var hálvbeiggi, og Anthon. Teir vóru fantastiskir trolaramenn, serliga Traberg.

Anthon doyði ungur. Tað var í 1924, at hann saman við øðrum av Tvøroyri var eina útferð til Stóru Dímun. Meðan teir fáast við línuna upp á oynna, hendir tað óhepna, at ein steinur loysnar úr berginum og rakar dímunarbóndan beint í høvdið. Hann doyði uppá staðið. Anthon var við til at fáa bóndan uppá oynna, og hetta fekk hann slysni av.

Ta fyrstu tíðina búðu tey annars í Islandi. Poul var um 10 ára gamal, tá ið tey komu til Føroyar. Hann gekk í skúla í Íslandi, og hann varð sendur í sveituna í summarfrítíðini at arbeiða fyri bøndurnar. Viðurskiftini vóru ikki góð. Har búði hann í einum úthúsi. Hetta dámdi honum einki sum rímiligt er.



*Gerda og Poul*

Tey blivu bert í Íslandi í trý ár, tá komu tey heimaftur. Poulina átti seks børn. Helgi var føddur í Íslandi. Tey fingu so sætta barnið, aftaná at tey komu heim aftur.

Abbin var sera strangur og avgjørdur. Hann var klokkari á Ísafirði. Tey skuldu í kirkju hvønn sunnudag, og aftaná skuldi Poul kunna fortelja orðarætt, hvat prestur hevði sagt í prædikuni, so ungur hann var. Og kundi hann ikki tað, varð hann sligin.

Abbi Poul var eisini bondskur á annan hátt. Tað var sagt um hann, at tá ið hann fór í eina krambúð og hann ikki slapp framat beinanvegin, hótti hann við, at tað finnast aðrar búðir enn hesa!

Tey komu annars at kenna ein keypmann har á staðnum og konu hansara, og tey vóru so góð við Poulinu og børnini.

## Valari við stórum V

Poul var valari við stórum V. Tað var stórur munur á at vaksa upp í Valinum og í Puntabyrgi. Valurin